## Skotarnir farnir



Eftir at hava merkt býarmyndina nú í nakrar dagar, eru eingir skotar at síggja í høvuðsstaðnum. Havnin líkist sær sjálvari aftur, ella næstan sær sjálvari, tí í morgun sóust framvegis leivdir frá skotunum hist og her í býnum. Eitt nú hevði Traðarmaðurin hjá Hans Paula Olsen uttanfyri býráðið fingið ein skotskan hatt á høvdið. Og tað má sigast, at hesin sá eins gott út og føroyska liðið gjørdi á vøllinum í seinna hálvleiki í gjárkvøldið.

## Rommedahl hetja

Danmark vann 2-0, tá teir í gjárkvøldið spældu á útivølli móti Letlandi. Dennis Rommedahl var stóra hetjan, tá hann tvær ferðir fyri steðgin sendi bóltin í letlendska málið. Eftir steðgin hevði Danmark fullkomuliga tamarhald á dystinum, og tó at teir ikki skaptu sær nakrar stórar møguleikar, so vóru bæði fjølmiðlar og landsliðsvenjari væl nøgdir eftir sigurin.

# Ketan leyp av í fyrra hálvleiki

**Føroyski venjarin harmaðist um, at hansara lið hevði søplað 1. hálvleik burtur og gleddist um, at tað í 2. hálvleiki var talan um uppreisn**

FÓTBÓLTUR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Føroyski landsliðsvenjarin iðraði seg um fyrstu trý korterini á Svangaskarði. Men hann helt, at seinni hálvleikur var framúr frá føroyska liðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Jógvan Martin Olsen iðraði seg eftir dystarlok.

- Tað er ikki ofta, at vit spæla okkum til so nógvar møguleikar, sum vit gjørdu í 2. hálvleiki. Tá ið tú ikki fært úrtøku burturúr teimum, so kanst tú ikki vænta at fáa stig og vinna sigrar. Vit áttu at havt fingið stig og kanska at havt vunnið eftir góða avrikið í 2. hálvleiki, men tað eru málini, sum gera av, hvør fær stig og vinnur sigrar.

Landsliðsvenjarin segði seg vera væl nøgdan við leikliga avrikið eftir steðgin:

- Ofta hevur føroyska liðið sparkað nógv og spælt lítið. Vit hava arbeitt miðvíst við at styrkja um samanspælið og at varðveita bóltin frammi á vøllinum, og tað megnaðu vit væl í 2. hálvleiki. Tað var ikki minst Christiani Lamhauge Holst fyri at takka. Avrikið hjá honum var fantastiskt.

Iðrar tú teg um, at tú ikki gav honum møguleikan frá fyrsta bríksli ímóti Italia?

- Andrew av Fløtum spældi væl ímóti Italia og Christian spældi væl í dag. Eg eri fegin um avrikið hjá teimum báðum, og eg eri fegin um avrikið hjá føroyska liðnum í trimum hálvleikum. Men eg eri ikki fegin um avrikið í 1. hálvleiki í dag.

Hvat var tað, sum kiksaði?

- Vit stóðu ikki saman sum eitt lið. Ímóti Italia var taktiska avrikið framúr. Tað vóru ongantíð meiri enn smáir tíggju metrar millum okkara spælarar, sum bakkaðu væl upp og hjálptu hvørjum øðrum. Í 1. hálvleiki í dag var einki samband ímillum keturnar, og tað riggaði ikki nóg væl í ketunum. Eg kann ikki siga so nógv um verjuna, tí hon gjørdi eisini í 1. hálvleiki sítt. Men longri frammi á vøllinum hekk tað ikki saman. Tað var spell, men samstundis var tað gott, at liðið megnaðu at reisa seg.

Heldur tú, at tað var stóri áhugin frá áskoðarunum, sum tyngdi spælararnar?

- Tað haldi eg ikki, at teir hugsaðu so nógv um. Uppgerðin ímóti Italia kravdi óvanliga nógva orku. Tí vóru fyritreytirnar kanska ikki optimalar í dag. Men í 2. hálvleiki vístu okkara menn, at teir høvdu neyðugu orkuna.

Iðrar tú teg um, at tú ikki skifti Óla Johannesen út beinanvegin, tá ið hann varð skaddur?

- Tey, sum hava ábyrgd fyri tí partinum, góvu mær boð um, at Óli var førur fyri at halda fram, eftir at hann í átta minuttir hevði fingið viðgerð. Soleiðis sum tað tørnaði út, so kundi tað kanska havt verið øðrvísi. Vit fingu í hvussu so er staðfest, at samansetingin við Fróða Benjaminsen og Jón Róa Jacobsen riggaði væl.

### – Orsaka

- Eg fekk eitt spark á nøsina, tá eg fór eftir einum bólti, og tað var tí, eg varð liggjandi uttan fyri vøllin so leingi. Tað bløddi nakað illa, og tí tók tað sína tíð at koma fyri seg.

Soleiðis sigur Óli Johannesen um snuddin, sum sendi føroyska liðskiparan í gólvið bert fáar minuttir inn í dystinum móti Skotlandi. Eftir átta minuttir kom hann tó aftur á vøllinum, men sjálvur var Óli skjótur at staðfesta, at hetta var betri ógjørt.

- Eg var púra vísur í, at eg var klárur at fara innaftur. Men eg kann bara staðfesta, at tað var eg ikki. Tað kostar okkum eisini fyrsta málið, og eg havi ikki orð fyri, hvussu keddur eg eri um hetta.

Men tá talan er um landsdyst, so er tað kanska trupult at góðtaka, at tú verður skaddur somikið tíðliga í dystinum?

- Sjálvandi. Tú vilt inn aftur á vøllin fyri mest sum ein og hvønn prís. Men eg kann bara staðfesta, at tað skuldi eg ikki gjørt í hesum føroyska. Tí annars kundi úrslitið væl verið øðrvísi.

**-mørk**



*Føroyski liðskiparin var í døpurhuga eftir landsdystin mikukvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Skotar trýsta teir stóru

**Skotski venjarin var ovurfegin um sigurin, sum ber við sær, at Skotland framvegis hevur møguleika at hótta Frakland og Italia**

FÓTBÓLTUR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Venjarin hjá skotska landsliðnum, Alex McLeish, fjaldi ikki, at hann var ovurfegin um, at tað hevði eydnast at vinna øll stigini á Svangaskarði, har hagtølini ikki hava verið við Skotlandi tvær tær seinastu ferðirnar.

- Hetta hevur verið eitt langt kappingarár fyri spælararnar, og hetta hevur verið eitt framúr gott ár fyri Skotland. Andin á liðnum er góður, men tað kennist eisini, at spælararnir eru troyttur, og at teir nú treingja til at hvíla seg. Tí var tað so gott, at teir megnaðu at halda fokus og vinna her í dag.

Eru vónirnar við sigrinum betraðar fyri at røkka endaspælinum?

- Nú fegnast vit um henda sigurin. Hann ber við sær, at vit framvegis hava møguleika sjálvir at gera lagnu okkara av, hóast eingin ivi er um, at Frakland og Italia eru favorittar. Um tað undan síðsta dystinum, sum verður ímóti Italia á heimavølli, framvegis verður soleiðis, at Skotland fer at hava møguleika at røkka endaspælinum, so fer tað at kennast hugaligt hjá øllum skotum.

Umførini vóru rættuliga ymisk?

- Eg var væl nøgdur við 1. hálvleik, tá ið vit hava nógv spæl og skapa fleiri málmøguleikar. Eftir steðgin hava vit lítið at siga. Føroyska liðið spældi fínan fótbólt í 2. hálvleiki, tá ið teir settu okkum undir rættuligt trýst, og teir vóru óhepnir ikki at fáa mál. Vit hava ein góðan málverja, og hann bjargaði okkum.

Vóru tað nakrir føroyskir spælarar, sum tú serliga legði til merkis?

- Eg legði serliga til merkis, at spælararnir, sum dagliga eru í donskum feløgum, men sum heild spældi Føroyar væl í 2. hálvleiki, svaraði væl nøgdi Alex McLeish, áðrenn hann og stóra skotska pressufylgi fór vestur í Vágar og aftur til Skotlands at halda summarfrí.

Í heyst fæst at síggja, um Alex McLeish og hansara menn um eitt ár fara at halda summarfrí, ella um teir fara at luttaka í EM endaspælinum í Sveis og Eysturríki.